# Sjagaklettur komin og farin

**Móttøka var á bryggjuni í Hvalba leygardagin, tá ið Sjagaklettur, sum er keyptur úr Íslandi, legði at. Navnið á skipinum stavar frá einum hamri omanfyri bygdina í Hvalba, har fólk plagdu at halda eyguni við sjórænaraskipum, sum komu til bygdina at ræna**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*



Millum klokkan 10 og 10.30 seinasta leygarmorgun stevndi tann triðji hvalbiartrolarin, Sjagaklettur saman við Steintóri, inn í havnina í Hvalba, har bygdaráði skipaði fyri móttøku. Steintór legði frá landi við væl av fólki umborð og sigldi út í fjarðamunnan at taka ímóti skipinum, sum hevur ligið til umvælingar á Skála síðan hálvan januar.

Á bryggjuni í Hvalba vóru bæði børn og vaksin samankomin at taka ímóti og eftir, at bygdaráðsformaðurin, Levi Niclasen og Otto Vest, formaður í trivnaðarnevndini, høvdu ynskt skipinum vælkomnum og góðan byr, høvdi fólk høvi at vitja umborð.

### Eigaraviðurskifti

P/F Steintór, sum eigur djúpvatnstrolaran, Steintór, eigur allan partapeningin í Sjagakletti, sum er keyptur úr Íslandi.

Nevndarformaður í P/F Sjagakletti, sum er dóttirfelag hjá P/F Steintór, er Jákup Pauli Hammer. Hann er reiðari og skipari umborð á Steintór. Systkinabarnið, Mikkjal Hammer, loysir av sum skipari umborð á Steintóri, men er annars stýrimaður umborð. Mikkjal er reiðari og nevndarformaður í P/F Sjagakletti.

Sjagaklettur er longu farin til fiskiskap, og skipari er Tórhallur Randrup. Við skipinum verða einir 10-11 mans. Umborð á Steintóri eru teir 11-13 mans.

Høvuðsveiðan hjá Sjagakletti verður upsi.

### Tollaksmessudagur skipadagur í Hvalba

Tað eru fleiri ár, síðan móttøka seinast var á bryggjuni í Hvalba, tí nýbygningur ella keypt kom til bygdina.

Jákup Pauli Hammer heldur ikki, at nøkur slík móttøka hevur verið, síðan Steintór legði til bryggju í Hvalba tollaksmessudag í 1985. Tvey ár frammanundan kom hin fyrri hvalbiartrolarin, Niels Pauli, og tað var eisini tollaksmessudag í 1983.

- Tað var av tilvild, at bæði skipini komu tollaksmessudag, men nú hini bæði fyrru vóru komin hendan dagin, hugsaðu vit, at tað hevði verið stuttligt, um Sjagaklettur eisini stevndi inn í havnina fyrstu ferð tollaksamessudag ár 2002. Men tíðin gjørdist ov knøpp. Hetta hevði latið seg gjørt, um vit loystu fyrr í Íslandi og løgdu at í Hvalba, áðrenn skipið fór á Skála til umvælingar. Men soleiðis bleiv tað ikki, sigur hann.

### Skipasýnið setir krøv

Sjagaklettur hevur ligið á Skála síðan hálvan januar og kostnaðurin av tí, ið gjørt er, liggur millum 4 og 5 milj. krónur.

- Skipasýnið setir somu krøv til eitt gamalt skip, sum sett verða til eitt nýtt skip, sigur Jákup Pauli.

Hann vísir á, at eitt av krøvunum hjá Skipasýninum var hæddin á arbeiðsdekkinum og hæddin í apteringini.

- Minsta kravið til hædd er 198 cm., og eru rúmini lægri enn tað, krevur Skipasýnið, at neyðuga hæddin onkusvegna verður útvegað. Í summum førum var talan bert um einar 3-4 cm., sum restaðu í.

Jakup Pauli sigur, at ein fittur partur av íløgunum eru farnar til at ganga hesum krøvum á møti.

Sjagaklettur hevur eisini fingið septiktanga og tanga til lensivatnið, sum skal pumpast upp, tá ið skipið kemur í havn og flytast norður til IRF.

### Tilsamans 12 milj. krónur

- Trygdar- og bjargingarútgerð umborð er nýggj, tí Skipasýnið góðtekur ikki skipanina hjá íslendingum við bjargingarbátum, sum verða skotnir út av skipinum. Somuleiðis er mobbkrani settur upp til bjargingarbátarnar.

Spøl og brúgvaútgerð eru tey somu, sum tá ið skipið kom úr Íslandi.

- Nú Sjagaklettur er farin til fiskiskap, stendur skipið í tilsamans 12 milj. krónum, og tá er fiskiloyvið hjá djúpvatnstrolaranum, Beintu, fyrrverandi Brimborg, tikið við.

Beinta er seld til Suðurafrika fyri 2-3 árum síðan.

Jákup Pauli heldur, at skipið er í hampiligum standi, nú umvælingarnar og broytingarnar eru framdar.

### Navnið Sjagaklettur

Navnið, Sjagaklettur, er ein hamari omanfyri bygdina í Hvalba.

Her fóru fólk í bygdini í gomlum døgum niðan á at hyggja, um tey sóu sjórænaraskip nærmast.

- Av hesum klettinum kundu tey síggja bæði eystur og vestur í hav, sigur Jákup Pauli Hammer at enda.

Nú hvalbingar hava fingið eitt skip í aftrat í flotan, kann roknast við, at flakavirkið í bygdini eisini hevur eitt uppaftur betri og tryggari grundarlag.

Umframt Niels Paula og Steintór, sum leggja nógvar lastir upp í Hvalba, eru Mýlingur og Brestir eisini trúgvir í Hvalba. Við Mýlingi og Bresti sigla fleiri hvalbingar, og sagt verður sunnaneftir, at fleiri av hesum monnum hava siglt hjá Kymbli í nógv ár.

Hóast flakavirkið noyðist at keypa fiskin fyri marknaðarprís, er nærliggjandi at hugsa sær, at flestu lastirnar hjá hesum fimm stóru trolarunum verða lagdar upp í Hvalba.



Skiparin Tórhallur Randrup við soninum, Tóka





# Norrøna fer møguliga undir fremmant flagg



*Verður verkfallið millum Reiðarafelagið fyri farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag drúgt, kann tað gera, at nýggja Norrøna fer í rutusigling í Norðuratlantshavi undir frammandum flaggi*

**Stendur verkfallið millum Reiðarafelagið fyri farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag við, kann tað enda við, at nýggja Norrøna verður flaggað út**

VERKFALL
*Edvard Joensen*

Ein avleiðing av verkfallinum í handilsflotanum kann gerast, at nýggja Norrøna kemur til Føroya fyrstu ferð undir fremmandum flaggi.

Jóannes á Váli, stjóri á Smyril Line, sigur við Sosialin, at verður verkfallið ikki av, áðrenn Norrnøna fer úr Lübeck fyrsta túrin til Føroya, er ein møguleiki, at hon verður skrásett undir øðrum flaggi enn tí føroyska.

– Handan møguleikan hava vit hugsað um, og hann kann gerast aktuellur, sigur Jóannes á Váli.

Hann sigur, at málið er kortini ikki avgjørt enn. Tað fer at verða viðgjørt í vikuni. Og fleiri møguleikar fara ivaleyst at koma upp at venda, sigur hann.

Ein møguleiki, hann nevnir, er at eitt nú Skipara- og Navigatørfelagið fer at geva undantaksloyvi til at Norrøna sleppur at sigla, hóast verkfall er millum yvirmenninar á brúnni.

Men tann møguleika dugir formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Ellintur Abrahamsen, ikki at síggja sum veruligan.

– Vit hava ikki viðgjørt nakað sovorðið, sigur Ellintur Abrahamsen. Men eg dugi iki at síggja, at Norrøna kann fara at fáa nakað undantaksloyvi fram um onnur skip.

Ellintur Abrahamsen sigur, at hann vónar inniliga, at verkfallið ikki verður drúgt. Men sum støðan er í løtuni stendur púra fast. Einki samband er millum partarnar, sigur hann.

Skipara- og Navigatørfelagið kravdi lønarhækkan svarandi til leingjan av arbeiðstíðini frá tíggju til tólv tímar. Eisini kravdi felagið eina størri hækking fyri nýggju Norrønu og tveir frídagar afurat.

– Eg skilti tað soleiðis, at Reiðarafelagið fyri farmaskip ikki vildi avvísa hetta, tá vit skiltust og høvdu avtalað at møtast aftur. Men morgunin eftir varð alt avvíst, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann ásannar, at tað kann gott vera, at skipini flagga út.

– Men verður tað úrslitið, er tað ikki okkara avgerð, vísir hann á. Men eg havi sagt fyrr, og sigi tað enn, at hendir tað, verða limirnir hjá okkum bara betri fyri skattaliga, enn teir eru í dag.

# Kanna tørvin á eldraíbúðum í Vágum

**Felagskommunan í Vágum er farin undir at kanna, hvønn tørv eldru borgararnir í oynni hava á eitt nú vardum íbúðum og røktartilboðum**

ELDRAPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*



*Jónhild Jørgensen, formaður í Felagskommununi í Vágum, sigur, at upprunin til kanningina, sum gjørd er av tørvinum hjá pensionistum í Vágum av eldrabústøðum, liggur í brævi frá kommunulæknunum í oynni, ið sum teir fyrstu vístu á tørvin*

Mynd: Edvard joensen

**Vágar:** Kannað verður nú, hvussu tey eldru í Vágum hava tað. Hvønn tørv hava tey á serligum bustaði? Kenna tey seg trygg við verandi støðu? Og hvat halda tey um almennu tænasturnar, teimum verða veittar?

Tað er Felagskommuna í Vágum, sum nu fer at senda spurnarbløð út til allar borgarar í oynni, sum eru eldri enn 65 ár og sum búgva í egnum bústaði.

Jónhild Jørgensen, formaður í Felagskommununi, sigur, at hendan spurnarkanningin er seinasti liður í eini størri fyrireikingarætlan, sum felagskommunan hevur staðið fyri.

Málið byrjaði við, at kommunulæknarnir í Vágum sendu kommunalu myndugleikunum eitt skriv, har teir vístu á, at tørvur var á eitt nú eldrabústøðum, sigur Jónhild Jørgensen.

Felagskommunan tók tá stig til at gera nakað við málið. Settur var ein arbeiðsbólkur at taka sær av hesum. Hann varð mannaður við starvsfólki av ellisheiminum, umboðum fyri heimarøktini, pensionistafelagnum, stýrinum fyri ellisheimið og fólki úr Felagskommununi.

Savnað er saman ymist tilfar, sum eitt nú, hvussu nógvir pensionistar eru í Vágum? Hvat vísa hagtølini, at tað fer at vera um eini 10 ár? Umframt ymsikt annað, sum viðkomandi er, sigur formaðurin í Felagskommununi

Tað seinasta tiltakið í hesum kanninararbeiðinum eru so hesi spurnarbløðini, sum nú verða send út í vikuni.

Í samband við hagtalskanning av, hvussu nógvir pensionistar fara at vera í Vágum um tíggju ár, sigur Jónhild Jørgensen, at tann kanningin, sum Hagstovan gjørdi fyri Felagskommununa í Vágum, vísti eitt heldur øðrvísi úrslit, enn frætt er um aðrastaðni. Hon vísti nevniliga ikki, at tað fóru at verða so øgiliga nógvir pensionistar fleiri enn í dag, uttan umleið sama talið, sigur hon.

Spurnarbløðini, sum send verða út hesa vikuna, skulu latast inn aftur í seinasta lagi tann 26. mars.

Tá tilfarið er komið innaftur, verður tað latið Granskingardeplinum fyri Økismenning í Klaksvík, har Dennis Holm fer at viðgera tilfarið og skriva eina frágreiðing, sum so verður latin Felagskommununi aftur.

– Hetta er neyðugt, sigur Jónhild Jørgensen, tí eldraøkið verður nú lagt út til kommunurnar at umsita. Og í grundini eru vit als iki ov tíðliga á veg.